gult6 cyan6 magenta6 svart6







*Ólafur Ragnar Grímsson plantar eitt træ í viðarlundini í Kunoy. Hann var kringur við spakanum*



*Unnustan hjá forsetanum, Dorrit Moussaieff, og unnustan hjá borgarstjóranum í Kunoy, Hanna Adam, stuttleikaðu sær nógv í viðarlundini í Kunoy*



*Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, á veg í viðarlundina í Kunoy at planta eitt træ*



*Vit áttu at gjørt tað til siðvenju, at íslendingar taka trø við sær, tá teir koma til Føroya, og at føroyingar taka trø við sær til Íslands, helt forsetin skemtandi fyri*



*Dorrit Moussaieff gav sær góðar stundir at heilsa upp á børnini kring um í landinum*



*Heini O. Heinesen, borgarstjóri í Kunoy, saman við unnustu síni, Honnu Adam, til reiðar at taka ímóti forsetanum og unnustu hansara*



*Á Vistarheiminum í Klaksvík hitti forsetin føroyingar, sum sigldu undir Íslandi í 20'unum*



*Dorrit Moussaieff fekk føroyskt skjal til gávus frá Klaksvíkar Kommunu*



*Unnusta forsetans treivst væl millum føroysku børnini*



*Júst komin á Kósabrúnna við Brimli*

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Maiken syrgdi fyri forsetanum




*Maiken Poulsen fyrireikaði vitjan forseta Íslands í Føroyum. Og vitjanin eydnaðist so væl, at hon fekk persónliga tøkk frá forsetanum. Sosialurin tosaði við Maiken umborð á Brimli, eftir at forsetin hevði vitjað í Norðoyggjum*

**Protokollfultrúin í Tinganesi, Maiken Poulsen, skipaði so væl fyri, tá forseti Íslands vitjaði løgmann, at hon fekk persónliga tøkk frá honum. Sum protokollfultrúi hevur Maiken altíð ábyrgdina av at skipa fyri, tá landsstýrið fær útlendska vitjan**

STARV
*John Johannessen*

– Tað er ein lætti, at forsetavitjanin er av, men eg eri ógvuliga fegin um, at hon eydnaðist so væl. Og eg eri serstakliga fegin um, at forsetin var so væl nøgdur, at hann takkaði mær persónliga.

Hetta Maiken Poulsen, protokollfultrúi á Løgmansskrivstovuni, eftir vitjan íslendska forsetans, sum var av leygarkvøldið.

Í sínum starvi sum protokollfultrúi hevur Maiken Poulsen høvuðsábyrgdina av at leggja alt til rættis, tá útlendskir gestir vitja løgmann og landsstýrið. Og hon hevur eisini havt alla ábyrgd av leggja til rættis og samskipa almennu vitjan íslendska forsetans í Føroyum.

Hetta hevur hon ivaleyst klárað framúrskarandi væl, tí júst eftir, at Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, hevði sett seg til rættis í flogfarinum aftur til Íslands, ringdi hann á fartelefonina hjá Maiken Poulsen og takkaði henni inniliga fyri nakrar væl eydnaðar dagar í Føroyum.

## Gjølla gjøgnumhugsað

Tá ein forseti kemur á almenna vitjan, er talan um eina vitjan á hægsta tignarstigi við øllum trygdartiltøkum og formleikakrøvum, ið hartil hoyra. Alt skal leggjast til rættis út í odd og egg, so einki er latið upp til tilvildina á allari ferð forsetans.

Tí hevur Maiken Poulsen eisini havt nógvar drúgvar arbeiðsdagar seinastu vikurnar.

– Forarbeiðið til hesa vitjanina hevur verið stórt. Vit hava fyrireikað vitjanina í fleiri mánaðir, og seinastu vikurnar hava verið ógvuliga strævnar. Vit hava arbeitt hvørt hvøld og út á næturnar eisini, fyri at fáa alt klárt, greiðir Maiken, protokollfultrúin, frá.

Av tí, at trygdartiltøkini eru so strong og væntanin um eina væl eydnaða vitjan so stór, tá ein forseti vitjar, er altíð neyðugt at hava fleiri tiltøk klár við síðuna av, um okkurt á skránni miseydnast, ella um forsetin kemur illa fyri. Hetta sammetir Maiken Poulsen við at telva.

– Tá tú fyrireikar eina slíka vitjan, skalt tú altíð hugsa fleiri leikir fram, júst sum í talvi. Tú mást seta teg inn í støðuna áðrenn hon er hend, júst sum tú í talvi má hugsa, hvat hendir, um tú fremur hendan og handan leikin. So kanska tað er ein fyrimunur, at eg telvaði nógv sum ung, sigur Maiken Poulsen, protokollfultrúi við einum smíli.

## Skráin helt

Sosialurin fylgdi við í ferðalagnum, tá forsetin vitjaði kring oyggjarnar í farnu viku. Vit høvdu fingið eina snotuliga innbundna skrá við øllum upplýsingum at halda okkum til. Í fyrstani tóktist hetta eitt sindur fjákut. Men vit funnu skjótt út av, at skráin var ógvuliga hent.

Og tað, sum eisini hugtók okkum var, hvussu væl skráin helt. Tað hendi seg onkuntíð, at vit gjørdust hálvan tíma seinkað. Men hetta varð altíð skótt vunnið inn aftur, so skráin helt.

Hetta var Maiken Poulsen sjálvsagt eisini glað fyri.

– Eg eri rættiliga væl nøgd við, hvussu væl skráin hevur hildið. Vit eru onkuntíð vorðin hálvan tíma seikað. Men tað er púra vanligt, og tí hava vit eisini lagt upp fyri í skránni, sigur Maiken Poulsen.

Maiken Poulsen hevur drúgvar royndir í, at fyrireika almennar vitjanir í Føroyum. Hon stóð fyri vitjanini, tá Vígdis Finnbogadóttir, sum fyrsti forsetin nakrantíð vitjaði í Føroyum í 1987. Harafturat hevur Maiken staðið fyri, tá drotningin hevur vitjað, og nú vit aftur fingu forsetavitjan. Eisini stendur Maiken fyri øðrum ráðharravitjanum, og tá sendiharrar vitja í Føroyum.

# Bíligt at ferðast til Danmarkar

**Frá leygardegnum og fram til 2. september ber til at flúgva til Danmarkar og heim aftur fyri smáar 1.900 krónur. Bæði flogfeløgini hava gjørt av at lække prísirnar fyri summarið**

FLOGFERÐSLA
*John Johannessen*

Leygardagin frættist, at Maersk hevði lækka prísin á ferðaseðlum til Danmarkar og heim aftur niður í 1.865 krónur írokað øll avgjøld.

Síðani hevur Atlantsflog avgjørt at taka sama stigið og lækka prísin niður í 1.500 krónur uttan ferðaavgjald fyri ferðaseðil báðar vegir. Tá avgjøldini eru íroknað, er prísurin tann sami, sum prísurin hjá Maersk.

## Løgin grundgeving

Tá Atlantsflog og Marsk í fjør vár fóru at bjóða bíligar ferðaseðlar á Danmarkarrutuni, fingu tey lovi til hetta frá Ferðslumálaráðnum, tí talan var um kampanjuprísir uttan fyri háárstíð. Lagt varð ikki upp til kampagnuprísir í sjálvari háarstíðini.

Príslækkanin í ár liggur kortini mitt í háárstíðini, har flogførini vanliga eru fullsett nærum hvønn túr. Sum skilst, hevur Ferðslumálaráðið í síðstu viku loyvt at lække prísirnar, tí nú er summarið í Føroyum vorðið »en trafiksvag periode«.

## Full flogfør

Magni Arge, stjóri fyri Atlantsflog, hevur ikki stórvegis viðmerkingar til grundgevingarnar í umsóknini hjá Maersk, men hann viðgongur, at hann gjørdist eitt sindur kløkkur, tá hann hoyrdi tíðindini.

Kortini hevur Atlantsflog valt at lække prísirnar á sama hátt, sum Maersk og í sama tíðarskeiði.

Men Magni Arge, stjóri, leggur dent á, at orsøkin til, at Altantsflog lækkar prísirnar er ikki, at flogfelagið hevur trupult við at fylla flogførini. Tey flúgva nærum fullsett á Danmarkarrutuni hvønn dag um summarið. Men Atlantsflog lækkar heldur prísin, tí tað ikki vil standa aftan fyri Maersk, tá tað ræður um at veita viðskiftafólkunum góðar sømdir.

Treytirnar fyri at fáa bíligan ferðaseðil eru hjá báðum flogfeløgunum, at minst tvey skulu ferðast saman, og at tey skulu vera burtur leygardag og sunnudag, tó í mesta lagi 21 dagar. Børn sleppa at ferðast við 33 prosentum í avsláttri.

PRÝÐISLUTIR
VID MOTIVUM ÚR NORRØNU GUDALÆRUNI




Anker Eli Petersen hevur designað eina spennandi røð av prýðislutum við motivum úr norrønu gudalæruni. Her eru 2 motiv - fleri eru at velja imillum.

Prýðislutirnir verða latnir í gávueskju við fittligum bóklingi um hvønn einstakan prýðislut.

Eitt frálíkt **gávuhugskot** - til studentin, føðingardagsbarnið, konfirmantin...

3arin

SMS - Tel 353535 - Fax 353536 - www.3-arin.com - 3-arin@3-arin.com